

Svøríki – Carola – Invincible



Danmark – Sidsel Ben Semmane – Twist of love



Finnland – Lordi – Hard rock hallelujah



Noreg – Christine Guldbrandsen - Alvedansen

# Trøll og álvar úr Norðurlondum

**Finnland og Svøríki sleppa at kappast í finaluni í Melodi Grand Prix leygarkvøldid. Harafturímóti er Silvia frá Ìslandi noydd at fara heim. Hon var ikki millum tey tíggju, sum sluppu vídari úr undankappingini**

TÓNLEIKUR
*inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Finalan í Melodi Grand Prix skal í ár avgerast í Athen. Svens-grikska Elena Paparizou sang Grikkaland til sigurin í fjør.

Í gjárkvøldið var undankappingin, har avgjørt varð, hvørji lond skulu kappast í finaluni. Heili 13 lond eru í dag noydd at pakka kuffertið og fara heim. Millum tey er Ìsland, sum møttist av buhrópum frá áskoðarunum. Silvia Night, sum umboðar Ìsland, hevur fingi átalu fyri ringan atburð, og at hon ikki hevur tikið kappingina fyri fult. Atkvøðurnar vóru heldur ikki nóg nógvar, til at hon slapp at verða verandi í kappingini.

Svenska Carola kláraði akkurát at koma við til finaluna. Hon hevur vunnið kappingina fyrr, og tað eru heili 23 ár síðani hon fyrstu ferð stóð á Grand Prix pallinum við sanginum Fræmling.

## Trøll úr Finlandi

Bólkurin, sum hevur verið orsøkin til flestu yvirskriftirnar, er Lordi frá Finnlandi. Tey fimm trøllini kláraðu eisini at koma víðari til finaluna.

Ein trýr næstan ikki sínum eygum tá ein sær finsku luttakararnar. Teir eru allir klæddir sum trøll ella monstur. Sangurin teir luttaka við eitur »Hard rock hallelujah«. Finnland hevur ikki haft nakra størri framgongd í hesi kapping, men í ár kann landið í hvussu so er verða víst í, at fólk leggja tey til merkis. Bólkurin er nokk eisini tey sum sveitta mest í Athen, tá teir ongantíð vísa seg uttan trølladraktirnar.

Hóast bólkurin sær øgiligur út, so er sangurin rættiliga góður. Tá teir serkønu úr øllum norðurlendsku londunum søgdu sítt um sangirnar, ið eru við, gjørdist Finnland nummar eitt. So blunda og lurta eru bestu ráðini, tá Lordi kemur á pallin.

## Dugur ikki at twista

17 ára gamla Sidsel Ben Semmane skal umboða Danmark í Grand Prix. Hennara sangur »Twist of love« fekk toppkarakter frá øllum telefonøkjum í Danmark.

Sangurin snýr seg um drongin Sonny, sum er forelskaður í gentuni Conny, men tað er hann ikki einsamallur um. Kappingarneytin O´Smarty er eisini forelskaður í Conny, men hann kann ikki dansa twist, og tí velur Conny Sonny. Ikki so djúpur tekstur, men Danmark er so einasta landið, ið hevur ein sang, sum gongur í twist takt.

Maðurin aftanfyri sangin hjá Sidsel eitur Niels Drevsholt. »Twist of love« er hansara fimta roynd í tí danska Grand Prixinum. Fyrstu ferð hann var við, var í 1983 við sanginum »Gi'r du et knus« sum bólkurin Snapshot framførdi. Sangurin bleiv nummar tvey, men gjørdist eitt rættuligt hit í Danmark.

## Ber til at vedda

Tey ymisku veddinga fyritøkurnar hava eisini sett síni odds á sangirnar, sum eru favorittar til sigurin leygarkvøldið. Hjá fyritøkuni Bettson fær ein 50 ferðir peningin um Danmark vinnur, fýra ferðir peningin um Svøríki vinnur og tíggju ferðir peningin um Finnland fer avstað við sigrinum.

Svøríki, Grikkaland og Rumenien eru londini, sum hava lægst odds. Tey trý londini eru eisini nevnd aðrastaðni sum favorittar til sigurin.

| | LAND | TÍN KARAKTERUR ( 1 - 12) |
|---|---|---|
| 1. | Sveis - six4one – "If We All Give a Little" | |
| 2. | Moldavia - Arsenium og Natalia Gordienko – "Loca" | |
| 3. | Ísrael - Eddie Butler – "Together We Are One" | |
| 4. | Letland - Cosmos – "I Hear Your Heart" | |
| 5. | Norra - Christine Guldbrandsen – "Alvedansen" | |
| 6. | Spania - Las Ketchup – "Bloody Mary" | |
| 7. | Malta - Fabrizio Faniello – "I Do" | |
| 8. | Tyskland - Texas Lightning "No No Never" | |
| 9. | Danmark - Sidsel Ben Semmane – "Twist of Love" | |
| 10. | Rusland - Dima Bilan –"Never Let You Go" | |
| 11. | Makedonia - Elena Risteska –"Ninanajna" | |
| 12. | Rumænia - Mihai Traistariu – "Tornero" | |
| 13. | Bosnien Herzegovina - Hari Mata Hari – "Lejla" | |
| 14. | Litauia - LT United – "We Are The Winners" | |
| 15. | Bretland - Daz Sampson – "Teenage Life" | |
| 16. | Grikkaland - Anna Vissi – "Everything" | |
| 17. | Finnland - Lordi –"Hard Rock Hallelujah" | |
| 18. | Ukraina - Tina Karol – "Show Me Your Love" | |
| 19. | Frankaríki - Virginie Pouchain – "Il était Temps" | |
| 20. | Kroatia - Severina Vuckovic – "Moja Stikla" | |
| 21. | Írland - Brian Kennedy – "Every Song Is a Cry for Love" | |
| 22. | Svøríki - Carola – Invincible" | |
| 23. | Turkaland - Sibel Tüzün –"Superstar" | |
| 24. | Armenia - André – "Without Your Love" | |